

# Nýtt gentukór á Toftum fagnar tónaskaldi

**Meðan dreingirnir hava verið í Íslandi og spælt fótbólt móti íslendskum javnaldrum úr vinarbýnum Hveragerði og aðrastaðni frá, hava genturnar í 5. og 6. flokki í Tofta skúla sungið nógv, og burtur úr tí er komið eitt nýtt gentukór**

Tað var í síðstu viku, at genturnar byrjaðu at venja í kóri, og síðani eru gentur úr teimum eldru flokkunum í skúlanum komnar afturat, so at tær nú eru um 30 í tali. Tær hava vænt fleiri barnasangir hjá Hans Jacob Højgaard, og gentukórið verður eitt av trimum kórum, sum fer at syngja á konsertini í Fríðrikskirkjuni í dag kl. 18. Júst í dag eru 100 ár síðani tónaskaldið og kórleiðarin Hans Jacob Højgaard, sáli, varð føddur, og hesum hevur ymist verið gjørt burtur úr í heimbygdini hjá honum.

Tað eru teir báðir lærararnir, Mikael Johan Heinesen og Petur Hans Hansen, sum venja gentukórið, og teir eru ovfarnir av hvussu hugagóðar genturnar eru at syngja, og teir eru á einum máli um, at sangtilfarið er bæði nógv og gott.

Tá Hans Jacob Højgaard var lærari á Toftum frá 1929 til 1953, var bygdin kend fyri sítt barnakór, ið saman við teimum vaksnu javnan var á konsertferð kring landið. Nú kundi mangt bent á, at hetta nýggja gentukórið heldur fram eisini eftir føðingardagin hjá tónaskaldinum, sum lærdi nógvar av ommunum hjá teimum at syngja í kóri.

Á konsertini í dag fer Kirkjukórið hjá Mikael Johan Heinesen eisini at syngja sangir hjá tónaskaldinum av Toftum. Summir eru lítið kendir millum manna, og síðani fer eitt felagskór við gomlum og nýggjum sangarum at syngja nakrar sangir hjá Højgaard og onkrar gamlar norðurlendskar travarar, sum serliga vóru kendir á Toftum. Á konsertini stjórnar Mikael Johan Heinesen øllum trimum kórunum.

Í sambandi við 100 ára føðingardagin kemur fløgan "Gev heiðursljóð" út. Á henni eru ymsar upptøkur av kórum á Toftum og løgini hevur Hans J. Højgaard gjørt, og hann stjórnar tí mesta. Tær fyrstu fløgurnar koma til landið í dag og verða at fáa til keyps í kirkjukjallaranum eftir konsertina.

*Nýggja gentukórið á Toftum. Genturnar eru um 30 í tali*

# Áhugaverdur DVD-filmur um Føroyar

**Felagið, tónleikur.fo, hevur givið ein DVD-film um Føroyar út. – Hjá føroyingurin kann filmurin nýtast til at greiða útlendskum gestum frá um Føroyar, meðan útlendingar kunnu ogna sær filmin sum eitt minni um Føroyar, sigur framleiðslustjórin, Eyðfinn Jensen**

DVD UM FØROYAR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Ein forkunnugur DVD um Føroyar er komin á gøtuna í dag. Við flottum myndum úr Føroyum fær hyggjarin innlit í føroyska náttúru, mentan, list og tónleik.

Tað er felagið, tónleikur.fo, ið gevur DVD filmin út. Eyðfinn Jensen er framleiðslustjóri.

– Hugskotið um ein DVD um Føroyar eigur Birgir Enni. Hann hevði sæð ein líknandi film um Grønland, og eg gjørdist hugtikin av hugskotinum, sigur Eyðfinn Jensen

Seinastu mánaðir hevur Eyðfinn tikið upp og savna tilfar saman til filmin, sum er hálvan annan tíma til longdar. Talan er um 20 smáfilmar, sum í miðal eru 5-6 minuttir hvør.

Umframt smáfilmarnar er eisini filmurin "Faroe Islands-ADifferent Experience" á DVD-filminum. Filmurin hjá Herlufi Sørensen fekk heiðursløn fyri at vera besti ferðavinnufilmur í Evropa í ár.

## Føroyingar og útlendingar

Framleiðslustjórin heldur, at DVD-filmurin um Føroyar vendir sær bæði til føroyingar og útlendingar.

– Hjá føroyingurin kann filmurin nýtast til at greiða útlendskum gestum frá um Føroyar, meðan útlendingar kunnu ogna sær filmin sum eitt minni um Føroyar, vísir hann á.

## Eingin stuðul

Eyðfinn Jensen greiðir frá, at mong hava sýnt verkætlanini áhuga, men áhugin at stuðla DVD-filminum hevur verið lítil. Hetta hevur havt við sær, at menninir handan verkætlanina sjálvir standa fyri fíggingini av filminum.




*–Eg royndi at finna stuðlar, men tað vísti seg skjótt verða tíðarspill. Nú vóni eg bara, at filmurin verður væl umtóktur og at tað fer at betala seg hjá okkum at geva hann úr, sigur Eyðfinn Jensen.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

– Eg royndi at finna stuðlar, men tað vísti seg skjótt at verða tíðarspill. Nú vóni eg bara, at filmurin verður væl umtóktur og at tað fer at betala seg hjá okkum at geva hann út, sigur Eyðfinn Jensen.

Nýggi DVD-filmurin fæst til keyps á bók- og fløguhandlum, Kunningarstovuni og á Ferðaráðnum. Eyðfinn Jensen sigur, at í fyrstu atløgu eru 1000 filmar gjørdir.



KOYRIKORT Í VÁGUM
Í GAMLA SKÚLA Í SANDAVÁGI
**Til persónbil:**
Týsdagin 14. september kl. 19.00
**Til lastbil:**
Týsdagin 14. september kl. 20.30



**Persónbil · lastbil · trailara og buss**
Tekning á tel 573 940
HAMMERS
KOYRISKÚLI
v/Johannus Hammer · Tel 573 940

**Awi Star 35 við fiskiloyvi og loyvi á bankan**
**Báturin hevur alla útgerð.**
**6 DNG 6000i snellur**
**og uml. 30 stampar av línu.**
**Mesta ferð 16.5 knob.**



**sí www.batur.fo**
TEL 228741 OG 218292

**BILAR TIL SØLU**



**Ford Anglia** · Árg. 1963 · Settur í stand frá A - Z
Ein góður ellisbilur
**Bíliga til sølu - kr. 35.000,-**



**Triumph Spitfire Mk 3** · Árg. 1969
· Settur í stand frá A - Z · Eitt gott keyp
**Einans kr. 65.000,-**

**Hans Elmar · TEL 332 877 og 210 877**

**Opel Corsa til sølu**



Árg. 1997 · Km. 82.000 · Vínreyður
Í góðum standi · Sóltak og eyka sett
av píkadekkum
Ring 216395

**GER KVETTI**
**Opel Astra 1600 bíliga til sølu**



**Árg 97 · km. 85.000**

**Bilurin er í sera góðum standi og sera økonomiskur í brúki.**

**Til sølu vegna flyting**

**Áhugaði vinarliga ringi á tel 25 28 25 ella maila á gudny78@msn.com**

Til Sølu



Hyundai Accent 1.3, frá 1997 hevur koyrt 52.000km, er í góðum standi. Til sølu fyri 48.000,-
Telefon 212087



NISSAN PRIMERA TIL SØLU
Árgangur: Apríl 1998
Motorur: 1.6
HK: 100
Hevur koyrt: 102.000 km.
Seinast til sýn: Februar 2004
**Prísur 60.000**
**Eru spurningar, ber til at ringja á tel 447031**
Sosialurin 341800

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg